## Ov lítil skattur kemur inn

Í Grønlandi eru skattamyndugleikarnir og arbeiðsgevararnir ósamdir um, hvør hevur skyldina av, at tað vanta næstan 350 milliónir í landskassanum. Tølini vísa, at umleið 1.000 grønlendskir arbeiðsgevarar hava ikki goldið landskassanum allan A-skattin. Claus S. Jensen, sum er stjóri í skattastýrinum, sigur við KNR, at orsøkin er fíggjarkreppan, tí hon hevur tikið beinini undan fleiri fyritøkum. Men tað tað heldur arbeiðsgevarafelagið ikki. Felagið sigur, at fíggjarkreppan hevur als ikki rakt vinnuna serliga meint ennm, og at fyritøkurnar hava heldur ikki trupulleikar við gjaldførinum. Ov sein bóking í skattaumsitingini er orsøkin, sigur felagið.



## Tingmenn møta illa

Á fundi í íslendska Altinginum í gjár noyddist formaðurin at útseta eina atkvøðugreiðslu, tí alt ov fáir tingmenn vóru í tingsalinum. Uppskotið, sum var til viðgerðar, var um val til Altingið, men áhugin fyri tí var eftir øllum at døma ikki serliga stórur. Morgunblaðið skrivar, at tá tingið eina løtu seinni skuldi atkvøða, komu tingmenn kropp á kroppi inn í tingsalin. Guðbjartur Hannesson, tingformaður, sigur við blaðið, at tingmenn hava møtt illa, nú flokkarnir hava stillað upp til tað komandi valið, og tí hevur formansskapurin biðið floksformenninar fáa sínar tingmenn at møta, tá tingfundur er.

# Nýtt konserthús í Havn

**Fólk sum um boða tónleikalívið í Havn hava í dag handað leiðsluni í Tórshavnar Býráð eitt uppskot um at byggja eitt konserthús í Havn við øllum hentleikum og plássi fyri 150 áhoyrarum**



*Arbeiðsbólkurin sum seinasta mánaðin hevur arbeitt við málinum um nýtt konserthús í Havn. Í dag er uppskotið handað leiðsluni í Tórshavnar Býráð*

**KONSERTHÚS**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ein fyrireikingarbólkur fer í dag at handa Heðini Mortensen og Boga Andreasen, ávikavist borgarstjóra og varaborgarstjóra í Havn eitt uppskot um eitt konserthús í høvuðsstaðnum.

Tað eru nøkur feløg við tilknýti til tónleikalívið í Føroyum, sum hava tikið hetta stig. Tey siga, at hetta er gjørt við teirri sannføring, eitt ament stað at framføra tónleik í manglar í Havn, og tí vilja tey varpa ljós á hendan stóra miss.

- Nógv eru tey, sum í gjøgnum árini, hvør sær, hava tikið stór tøk við tí fyri eyga at royna at loysa hetta týdningarmikla mál, men illa hevur gingist í hond. Hóast stóra saknin av einum líkinda stað at hava framførslur av øllum slag, hevur tónleiklívið, mestsum upp á tross blómað, og kunnu vit gleðast um hetta. Men tað skerst ikki burtur, at eitt miðsavnandi stað fyri framførslur í Havn hevði ríkað enn meira um útboðið av dygdargóðum tónleikaupplivingum fyri borgaran, sigur fyrireikingarbólkurin.

Tey halda, at eitt slíkt stað er eins umráðandi fyri trivnaðin hjá áhoyraranum sum tónleikaranum, og tí hava tey valt at kalla tað eitt konserthús.

Ein fyrireikingarnevnd hevur seinasta mánaðin sitið og arbeitt við málinum og fer í dag at handa borgar- og varaborgarstjórunum í Tórshavnar Býráð eitt felags skriv, ið er stuðlað av hesum feløgum:

FUTT
Jazztónleikarafelagið
Fólkatónleikarafelagið
Einleikarafelagið
Felagið Føroysk Tónaskøld
Mentón
Kórsamband Føroya
Umboð fyri áhoyrarar
Havnar Jazzfelag
Konsertfelagið
TUTL
FUR

Umframt hetta verður upplýsandi tiltak í Norðurlandahúsinum fríggjadagin kl. 18.00. og kl. 22.00

Feløgini siga soleiðis í brævi til borgarstjórarnar:

»Í hesum døgum hava vit tikið stig til at savna øll tónleikafeløgini og umboð fyri áhoyrararnar í Havn.

Í hesum sambandi hava vit havt fundir og kjak um konserthús í Havn, og eru samd um at gera ein vørr fyri at skapa nøktandi og virðiligar umstøður at framføra tónleik í býnum.

Ein samdur fyrireikingarbólkur hevur valt Ólav Olsen, tónleikara at vera felags umboð.

Orsøkin til hetta átak eru støðugt tvørrandi umstøðurnar fyri tónleikaframførslu í býnum, og vilja vit fegin verða við til, saman við Tórshavnar Býráð, at bøta um verðandi umstøður.

Eitt konserthus má í minsta lagið hava:

- Pláss fyri 80-150 sitandi áhoyrarum
- Hita og toilett
- Ein rúmligan pall
- Neyðuga ljóð- og ljósútgerð
- Serstaka entré við atgongumerkjasølu og garderobu.
- Backstage-høli til upptraðkandi ( við atgongd til wc )
- Skrivstovu
- Goymslu/-ur

Tað er ein sjálvfylgja at eitt konserthøli er gjørt í samráð við køn innan akkustik, og at ljóðgóðskan er optimal.

Umframt er umráðandi at innrættingin av hølunum er av slíkum slagi, at gestir og tónleikarar fáa eina mennandi heildarupplivíng av konsertum.

Vert er at bíta merki í, at hetta fyri Tórshavnar bý er eitt sera átroðkandi mál sum hevur skund, og at ein skjót og nøktandi loysn vil verða við til at nøra um býarinnar tónleikalív.«



*Fyrr í vikuni vóru nakrar tónleikarar saman við varaborgarstjóranum, Boga Andreassen og hugdu eftir hølum millum Reinsaríið í Tórsgøtu og Miðlahúsið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Skráin fyri tiltakið í Norðurlandahúsinum í annaðkvøld er hendan:

- Vælkomin v/ Ólavi Olsen
- Nikos Kapnas spælir
- Gunnar Madsen (ROSA), um spælistøð
( Høvi verður at seta spurningar )
- Steðgur
- Jákup Weihe, skemt
- Jóhannes Steingrund, um akkustik
- Kórið Kata syngur Kl. 22.00 er lítil konsert og hugni í Havnar Klubba, har bólkarnir Kapnas & The Poulsens og Heiðrikur á Heygum spæla.

Bæði tiltøkini er ókeypis.